# Hósdagur 24. februar

**ÚF**

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Høgni Thomsen í Nólsoy lesur.
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Jákup Magnussen er vertur
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Høgni Thomsen í Nólsoy lesur.
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Fyri hundrað árum síðani**(e) - Úr Føroyingatíðindum og Fuglaframa 1900. Sverri Egholm leggur til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Øld eftir øld** (e) - Søguligt yvirlit eftir Hans Jacob Debes professara. Seinni partur. Jógvan Arge lesur.
11.30 **Dansur á Bryggjubakka** (e)
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen stílar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Dalurin fagri** - 2. partur av skaldsøgu eftir Gunnar Hoydal. Hans Tórgarð lesur.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.30 **Norðurlendskur tónleikur**
15.30 **Barnaløtan**
17.00 **Lovsangur**
18.00 **Bønartænastan**
19.00 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
20.00 **Barnaløtan** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð**(e) - **Lovsagur**
21.00 **Bønarlinjan** v/ ym. luttakarum
23.00 **Vit gevast**

**Rás 2**

9.00 **Lættur tónleikur**
9.45 **Orðið** -Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. -



Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Beinleiðis sending við tónleiki og práti** - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Middagstónleikur**
13.00 **Norðlendskur tónleikur**
14.00 **Non Stop** - **TV 2**
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Tónleikur**
16.00 **Seinnapartur** - Løtt innsløg. Smátíðindi. Tónleikur.
17.00 **Barnatímin** - Lissi og Oddbjørg leggja til rættis
17.30 **Barnasangir**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Nátturðatónleikur**
19.00 **Highway 83** - Ungdómssending. Miðlabreytin. Tónleikur, ítróttur, spurnarkapping o.a. - 10. flokkar í Havn leggja til rættis.
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Tónleikur frá 90'árunum**
22.00 **Jukebox** - Lurtarin velur løgini. Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@post.olivant.fo
23.00 **Orðið**(e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen

**svf**

18.15 **Upp á tá** 4
18.30 **Øskufía** 8:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **20. øld** 5:12 - ensk dokumentarrøð
21.45 **Krimitímin: Harri á heiðini**3:3
22.35 **Ferðafrásøgn: Vietnam**
23.20 **South Park** 14 - am. kult-teknirøð
23.40 **Liðugt**

**EUROSPORT**

7.30 **Luge**
8.00 **Windsurfing**
9.00 **Football**
12.00 **Football**
13.30 **Athletics**
14.30 **Athletics**
15.30 **Cycling**T
16.30 **Football**
18.00 **Olympic Games**
18.30 **Motorsports**
19.00 **Football**
20.00 **Football**
22.00 **Boxing**
23.00 **Motorsports**
23.30 **Trial**
0.30 **Close**

**3**

5.00 **Teknifilmur**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **The Nanny**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Murder she wrote**
10.55 **Days of our life**
11.45 **Days of our life**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Americas Funniest Homevideos**
13.30 **Golden Girls**
14.00 **Little House on the Prairie**
14.55 **J. A. G.**
15.50 **Americas Funniest Homevideos**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **The Nanny**
18.00 **Sabrina - the Teenage Witch**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst**
20.00 **Gitte og Camilla i sneen**
20.30 **Charmed**
21.25 **SexOrama**
21.55 **The Nanny**
22.25 **Dagens Nyheder på TV3**
22.35 **Drew Carey**
23.00 **Married with children**
23.30 **Unhappily Ever After**
0.00 **Home Improvements**
0.30 **Monty Pythons Flying Circus**
1.00 **Ellen**
1.25 **Caroline in the City**
1.50 **Hvide Løgne**
2.20 **Godnat**

**BBC WORLD**

0.00 **World News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Holiday**
2.00 **News – Weather**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **How Buildings learn: »4**:6 **Unreal Estate«**
6.00 **World News – Weather**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News – Weather**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News – Weather**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News – Weather**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report – Weather**
13.30 **The World Today**
14.30 **How Buildings learn: »4**:6 **Unreal Estate«**
15.00 **World News – Weather**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News – Weather**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News – Weather**
20.30 **Earth Report: »Central Africa – Short on Land«**
21.00 **World News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC PRIME**

0.00 **TLZ: »The American Dream – Great Expectations«**
1.00 **TLZ: »Science in Action – Sound«**
1.20 **TLZ: »Science in Action – Electricity«**
1.40 **TLZ: »Science in Action – Photosynthesis«**
2.00 **TLZ: »Edison – The Invention of Invention«**
2.50 **TLZ: »Pause«**
2.55 **TLZ: »Keywords«**
3.00 **TLZ: »The last of the Liberties«**
3.25 **TLZ: »Pause«**
3.30 **TLZ: »No Labys at 35.000 Feet«**
3.55 **TLZ: »Keywords«**
4.00 **TLZ: »Hallo aus Berlin – Gesundheit«**
4.15 **TLZ: »Hallo aus Berlin – Ferien und Feste«**
4.30 **TLZ: »German Globo – Die Party«**
4.35 **TLZ: »Susanne«**
4.55 **TLZ: »German Globo – Die Ferien«**
5.00 **TLZ: »Twenty Steps to better Management – Drama«**
5.30 **TLZ: »Twenty Starting Business English«**
6.00 **Jackanory: »Tommy Miner & the Mystery Spaceship«**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Two Old Boys«**
8.20 **Change that: »Harrogate«**
8.45 **Kilroy**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
11.00 **TLZ: »The Photo Show«**
11.30 **Ready Steady Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Harrogate«**
13.00 **Style Challenge: »Two Old Boys«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Ready Steady Cook**
15.00 **Jackanory: »Tommy Miner & the Mystery Spaceship«**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **Classic Top of the Pops**
16.30 **Keeping up Appearances**
17.00 **Dad's Army: »My British Buddy«**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Auntie's EastEnders Birthday Bloomers**
19.00 **The Brittas Empire: »The Christening«**
19.30 **The Blackadder: »Witchsmeller Pursuivant«**
20.00 **Casualty: »To have and to hold«**
21.00 **Absolutely Fabulous: »ISO-Tank«**
21.30 **John Session's likely Stories: »The End of the Story«**
22.00 **Loved up**
23.10 **O Zone**
23.30 **Songs of Praise**

***ÚF – Hósdagur kl. 7.15:***

## Barnaløtan

Vit frætta aftur frá drumbi og hinum huldunum. Handan Huldudal ganga smáhuldurnar á skúlaskeiði, og í morgun fer Drumbur eisini við. Hann er sjálvsagt spentur, og tað eru mamman, pápin og omman eisini, men hvussu man fara at gangast honum?



***TV3 - Hósdagin kl. 19.00:***

## Efterlyst

Beinleiðis kriminalsending

Tina Riising verður nú aftur at síggja á skýggjanum, eftir at hon hevur verið burtur í hálvt annað ár. Saman við løgregluni roynir liðið handan »Eferlyst« hvørja viku at uppklára brotsgerðir av ymsum slag. Higartil hevur hetta hjálpt í fimta hvørjum máli.

Henrik Ørum er framvegis við í sendingunum, har hyggjarar kunnu svar upp á spurningar um brotsgerðir og revsing av hesum.

***TV3 - Hósdagin kl. 20.00:***

## Gitte og Camilla i sneen



Skígenturnar, Gitte Schnell og Camilla Wisøefeldt hava fulla ferð á. Eisini er ferð á uttan fyri skíheyggirnar, har tær fara við tveimum mannfólkum til ein túr í alpunáttini. Gitte vaknar næsta morgunin, og kemur eftir, at hon hevur sovið oman á einum eysturríkskum fjósi. Hin óvanda skígentan, Camilla, verður víst til barnaflokkin og fer tí at troysta seg nøkrum donskum skíbumsum, sum gera tað ótrygt at vera á St. Anton.

***TV3 - Hósdagin kl. 21.30:***

## SexOrama

Erotisk dokumentarsending

Teir arbeiða í loyndum, menninir, sum selja sex fyri pening. Á sexpallinum í Danmark, er nakrir fáir »gigolos«, sum veita bæði giftum og ógiftum konufólkum tænastur. SexOrama fer við teimum dýru dreingjunum til arbeiðis. Dýrir, tí við eini tímaløn upp á 1.300 kr. og 20 vitjanum um vikuna, kann sex gott gerast ein sera góð vinna. Men hetta er eisini ein vinna, sum hevur stóran kostnað, tí tað kostar nógv sálarliga at selja kropp sín.







e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Fangaður í netinum

*Fuglfirðingar vilja ikki lata málverjan, Rúna Joensen, flyta úr felagnum, uttan at teir fáa pengar fyri hann*

Jákup Mørk

Rúni Joensen er vorðin lutur í einum stríði um, hvørjar tulkingarnar eru galdandi, tá leikarar, sum hava verið sáttmálabundnir, skifta úr einum felag í annað

Fyri góðum ári síðani samtykti aðalfundurin hjá Fótbóltssambandinum, hvørjar reglur skuldu verða galdandi, nú føroysk feløg eisini vóru farin undir at skriva sáttmálar við leikarar sínar.

Í fyrsta umfari varð avgjørt, at FSF skuldi gera uppskot til ein standardsáttmála, og á aðalfundinum fyri einum ári síðani varð so endaliga samtykt, hvørjar reglur vóru galdandi á økinum.

Nú er henda skipanin so roynd í eitt ár, og nærliggjandi er tí at spyrja, hvussu henda skipan hevur riggað.

Tá skipanin er nýggj, eru allir lutir hennara sjálvsagt ikki royndir enn, men á onkrum økjum er í hvussu so er komið til skarpskeringar, nú leikarar í vetur hava gjørt av at flyta til annað felag enn tað, sum teir hava umboðað í farna kappingarári.

Ein av hesum leikarum er málverjin, Rúni Joensen, sum í farna ári vardi málið hjá fuglfirðingum, eftir at hann árið framman undan hevði verið í hópinum hjá GÍ.

Útlitini fyri spælitíð á besta liðnum hjá gøtumonnum vóru tó ikki serliga góð, tí gøtumenn hava seinnu árini havt tveir av landsliðsmálverjum okkara á hesum plássi.

Tískil gjørdi Rúni Joensen fyri einum ári síðani av at fara til grannabygdina, har útlitini fyri dystarvenjing vóru munandi betri. Farna kappingarár vardi hann so málið hjá fuglfirðingum, og hóast støðan á stigatalvuni var lítið hugalig, so munnu avrikini hjá Rúna ikki hava verið av leið.

Í øllum førum vóru boð eftir honum úr øðrum felag, tá føroysku liðini í vetur gjørdu seg út til komandi kappingarárár, og Rúni tók av einum tilboði frá runavíkingum um, at koma at leika við teimum.

Hetta gav honum jú møguleikafyri fyrstudeildarfótbólti komandi kappingarár, so í hansara verð var einki ivamál. Runavíkingar vóru eisini fegnir um, at tað hevði eydnast teimum at finna ein nýggjan málverja, og so skuldi ein hildið, at allir partar vóru nøgdir.

### Krevja pening

Trupulleikin er tó tann, at Fuglfirðingar tilskila sær rætt til at krevja pening, nú Rúni fer úr felagnum.

Úr Fuglafirði frætta vit, at tey sum so einki hava ímóti, at Rúni fer til Runavík, men hinvegin hava tey í sínari tíð gjørt eina íløgu í leikaranum, og vilja tey tískil hava eina afturbering hesum viðvíkjandi.

Sáttmálin, sum Rúni hevði við fuglfirðingar er runnin út, og metti hann tískil, at hann hevði frítt at fara. Sambært teimum reglum, sum altjóða fótbóltssamgongurnar, UEFA og FIFA, hava stungið út, hevur leikari eftir sáttmálalok frítt at fara, tó at fótbóltssambondini í ymsu limalondunum kunnu áseta nærri reglur, sum hava til endamáls at tryggja feløgunum.

Í Føroyum er slík regla eisini komin í gildi, og verður har staðfest, at um áhugaleikari, sum hevur leikt á fyrsta liði felagsins, fer til annað felag í Føroyum, hevur felagið rætt at krevja 10.000 kr. fyri leikaran, umframt at felagið kann krevja endurgjald fyri positivt staðfestar útreiðslur.

Stóri spurningurin í hesum máli er tí helst, um leikari, eftir at sáttmáli hansara er runnin, aftur er at meta sum áhugaleikari, ella um talan tá er um yrkisleikara, sum í løtuni ikki hevur nakran sáttmála.

Úr Fuglafirði frætta vit, at tey enn einki greitt svar hava fingið upp á henda spurning, og vilja tey tískil halda fast við sítt. Ein onnur orsøk til støðufesti teirra er, at tey fegin vilja hava staðfest, hvussu skipanin riggar, soleiðis at feløgini eru fullgreið um, hvørjar treytirnar á økinum eru.

Eisini vilja tey hava staðfest, hvørjar útreiðslur talan er um, tá tað í reglugerðini verður sipað til positivt staðfestar útreiðslur.

### FSF ger av

Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF sigur við Sosialin, at bara tað at sáttmáli við leikara gongur út, merkir hetta ikki, at leikarin nú aftur er áhugaleikari.

Hinvegin fær Ísak ikki úttalað seg í um hetta málið, við tað at hann ikki hevur sæð nakað skjalatilfar ella líknandi.

Vanliga er tað jú soleiðis, at tá spælari skiftur felag, er hetta í fyrsta umfari ein spurningur, sum feløgini greiða sínamillum, og ikki fyrr enn tað kemur til skarpskeringar, trínur FSF upp í leikin.

Verður støðan tann, at NSÍ og ÍF ikki semjast um málið, verður tað í fyrsta lagi kappingarnevndin hjá FSF og í øðrum lagi dómsnevndin, sum gera, hvussu málið eigur at avgreiðast.



*Eftir stendur Rúni Joensen, málverjin, sum í løtuni er fangaður í heilt øðrum meskum enn teimum, sum hann vanliga verjur fyri*



# Loysnin varð varandi

*Christian Poulsen og nevndin í Neistanum eru nú komin ásamt um samstarv restina av kappingarárinum*

Jákup Mørk

Sum nevnt í ÍtróttaSosialinum týsdagin, var eitt nýtt andlit at síggja á venjarabeinkinum hjá besta kvinnuliði Neistans seinasta vikuskifti.

Hóskvøldið í farnu viku gjørdi nevndin í felagnum nevnliga av, at Rene Kristensen, sum higartil hevði vant kvinnuliðið, skuldi sigast úr starvi.

Í hansara stað varð Christian Poulsen setttur at røkja sessin fyribils, men tá visti hann ikki at siga, hvørt talan fór at gerast um varandi starv ella ikki.

Eftir at bæði venjari og nevnd, nú hava havt nakrar dagar at umhugsa støðuna, er so greitt, at Christian røkir venjarastarvið tað sum eftir er av kappingarárinum.

### Gamal í garði

Tey, sum hava kunnleika til hondbóltsfelagið Neistin, munnu helst ikki vera serliga bilsin um, at tað varð júst Christian, sum tók hesa uppgávu á seg.

Felagið hevði fyri neyðini at finna eina loysn í skundi, og tá er aloftast vanligt at hyggja innan egnar karmar eftir fólki, og har hevur Christian verið virkin í nógv ár.

Ungdómsárini leikti hann annars við Kyndli, men síðani hann kom upp í unglingabólkin, hevur hann verið virkin í Neistanum.

Jón Kragesteen, formaður í Neistanum, sigur við Sosialin, at

# Broyting í skránni

Hondbóltssamband Føroya boðar frá, at orsakað av konsertini við Creamy, sum verður í Ítróttarhøllini á Hálsi, er dysturin millum H71 og VÍF, fluttur.

Upprunaliga var ætlanin, at dysturin skuldi leikast 19. februar kl. 16.00. Hetta er nú broytt, soleiðis at dysturin ístaðin verður mikudagin 23. februar kl. 19.45